# Tað manglar bert golf-vøllurin í oyggjaleikunum



*Jørgen Petterson, oyggjaleikaforseti, í Rás2*

Mynd: Jens Kristian Vang

**OYGGJALEIKIR** Ein golfvøllur er tað, sum skilir ÍSF frá at sleppa at hýsa oyggjaleikunum innan 10 ár. Onnur hallar- og vallarviðurskifti eru í lagi, sambært altjóða oyggjaleikaforsetanum, Jørgen Petterson úr Álandi

Heri Simonsen

Jørgen Petterson, forseti í IGA – Internation Island Games Association – vitjaði í Føroyum í farnu viku. Endamálið við vitjanini var at kunna seg við umstøðurnar og viðurskiftini í Føroyum, nú ÍSF fer at streingja á at fáa oyggjaleikirnar til Føroya í 2021. Oyggjaleikirnir hava ikki verið í Føroyum síðani 1989. Á Føroya-vitjanini sá Jørgen Petterson vallar- og hallarumstøðurnar í Føroyum, umframt at møta ítróttarleiðarum, løgmann Kaj Leo Johannesen, borgarstjórum kring landið, umframt onnur, sum varða av viðurskiftunum innan ítrótt.

### Entusiasman í Føroyum er stór

Spurdur um hvat kvalifiserar Føroyar, og hvat diskvalifiserar Føroyar at hýsa oyggjaleikunum í 2021, er Jørgen Petterson ógvuliga avgjørdur.

– Tað er einki, sum diskvalifiserar Føroyar at hýsa oyggjaleikunum! Her í Føroyum er ein ógvuliga stór entusiasma, og eitt ógvuliga stórt hjartalag, tá um ítrótt ræður. Kunnleikin um ítrótt, og um ítróttarlig viðurskifti er eisini framúr í Føroyum, tað hevur tað altíð verið í Føroyum, hvat eg minnist, staðfestir Jørgen Petterson.

### Golfvøllurin fattast

Jørgen Petterson kemur tó inn á tað, sum manglar í, fyri at fáa oyggjaleikirnar heim til Føroya aftur.

– Føroyingar duga sín ítrótt. Tað skuldi tó verið ein fyrimunur, at ein eisini hevði ein golfvøll her í Føroyum, tí golf er ein ítrótt, sum hevur ein ógvuliga sterka støðu á oyggjaleikunum. Síðani golf gjørdist partur av oyggjaleikunum í 1991, so hevur golf altíð verið ein ítróttargrein á Nat West Island Games, og hevur tí vunnið sær eina sterka støðu, greiðir Jørgen Petterson frá, og letur ongan iva verða um, at ein golfvøllur hevði kunnað koppað føroysku vónunum tann rætta vegin.

### Aðrar umstøður eru í lagi

Burtursæð frá einum altjóða golfvølli, sum hevur 18 hol, so letur Jørgen Petterson væl at umstøðunum í Føroyum annars.

– Umstøðurnar í Føroyum eru góðar annars. Her eru nógvir góðir fótbóltsvallir og hallir, og tit hava eina fantastiska fimleikahøll. Í Tórshavn eru eisini nógvar hallir og vallir, har tað er stutt frástøða millum hesar hallir og vallir, sum avgjørt er ein fyrimunir, staðfestir Jørgen Petterson. Spurdur um tað, sum manglar í eigur at kunna røkkast innan 10 ár, svarar Jørgen Petterson avgjørdur.

– Ja so langa tíð kann tað neyvan taka at byggja ein golfvøll, undirstrikar Jørgen Petterson.

### Fólkið má verða við

Oyggjaleikirnir í Álandi í 2009 hava havt stóran týdning fyri álendska samfelagið. Fólkið gav leikunum sín fulla uppbakkning, og meir enn 1.000 sjálvbodnir álendingar, og enntá sjálvboðin frá øðrum londum gjørdu sítt til, at leikirnir eydnaðist so væl. Jørgen Petterson heldur, at talan er um góð minnir, sum tað álendska fólkið kann liva uppá leingi.

– Almenningurin má spæla við, um ein skal hýsa oyggjaleikunum, slær Jørgen Petterson fast.

### Væntar góðar oyggjaleikir í summar

Hóast Isle of Wight upplivir ringar búskaparligar tíðir, og hóast oyggin ikki hevur eitt ov nýmótans undirstøðukervi, so væntar Jørgen Petterson, at oyggjaleikirnir í summar verða væleydnaðir. Meir enn 3.000 íðkarar fara at taka lut á leikunum, og tað verður ikki so ræðuliga langt ímillum kappingarøkini, og Jørgen Petterson heldur, at fyrireikarnir á Isle of Wight hava tamarhald á støðuni. IGA-forsetin vónar ikki, at ov nógvar av teimum europeisku oyggjunum fara at senda eitt fátal av ítróttarfólki til oyggjaleikirnar á fjarskotnu oynni, Bermuda í 2013.

– Nú hava Bermuda og hinar fjarskotnu oyggjarnar ferðast langt til oyggjaleikirnar hvørja ferð, nú mugu vit so tola at skula ferðast langt í 2013, slær IGA-forsetin fast.

## Golfdreymurin og oyggjaleikadreymurin

**GOLF** Nú vóna føroysku golfíðkarnir, at tað brestir fyri nev, og at tey kunnu fáa sín golfvøll, og Føroyar samstundis kunnu fáa sínar oyggjaleikir

Heri Simonsen

Lykilin til at fullføra oyggjaleikadreymin liggur úti á Glyvursnesi. Jógvan Amonson, formaður í Tórshavnar Golfklubba vónar, at teirra dreymur um ein nýggjan, altjóða golfvøll, og dreymurin um at fáa oyggjaleikirnar til Føroya í 2021 kunnu ganga upp í eina hægri eind. Formaðurin í Dansk Golf Union var í Føroyum fyri nøkrum árum síðani, og hann lat ongan iva verða um, at golf fer altíð at standa frammaliga hjá bretskum ítróttarleiðarum, og tí eisini teimum mongu bretsku oyggjunum, ið kappast á oyggjaleikunum.



*Jógvan Amonson, formaður í Tórshavnar Golfklubba*

Savnsmynd

### Krevur stórt økið

Ein altjóða golfvøllur krevur tó eitt stórt økið. Jógvan Amonson greiðir frá, at ein golfvøllur fer at krevja eitt økið, sum liggur millum 600.000 og 700.000 fermetrar. Talan er um eina stóra íløgu, men íløgan kann vinna seg aftur. Føroyska ferðavinnan fer at hava eitt eyka kort á hondini, og eldri og tilkomin ítróttarfólk, og onnur við fáa møguleikan at íðka eina ítrótt, sum ein kann íðka langt upp í árini.

– Golf er einasta ítrótt, har tú kanst byrja íðka, tá tú ert farin upp um 50 ára aldur, staðfestir Jógvan Amonson. Tórshavnar Golfklubbi hevur eitt jaligt samskiftið við Tórshavnar Býráð, men hevur sum er ræðisrætt yvir 320.000 fermetrum, sum ikki er nóg mikið av lendi, um ein fullfiggjaður altjóða golfvøllur við 18 holum skal standa liðugur í 2015, tá ÍSF skal leggja boð inn uppá oyggjaleikirnar í 2021. Tað fer ikki at verða nóg mikið, at ein altjóða golfvøllurin er í stoypiskeiðini ella »á tekniborðinum« í 2015. ÍSF má hava trumfin í hondini tá. Trumfkortið liggur úti á Glyvursnesi!

heris@sosialurin.fo